# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Raðfestið øðrvísi

Eitt neyðugt og skilagott orðaskifti hevur tikið seg upp í kjalarvørrinum á útspælinum hjá landsstýrismanninum Magna Laksáfoss um at gera broytingar í raðfestingini av almennu íløgunum. Og vónandi fer hetta at verða raðfest frammaliga í tí samfelagsliga orðaskiftinum restina av árinum.

Hetta orðaskiftið snýr seg nevniliga um, hvussu vit í Føroyum skulu raðfesta okkara íløgur komandi árini men eisini hvussu vit raðfesta rakstrarjáttanir á fíggjarlógini. Væl vitandi at landsstýrið hevur ein lista við raðfestingum, so vita vit øll av royndum, at einki stendur í stað. Tíðir skifta og broytast og mugu politisku avgerðirnar eisini lagast eftir tí. Okkara politikarar mugu so sanniliga eisini eftirmeta raðfesting av íløgum sohvørt og hava vilja og dirvi til at fremja broytingar, eisini um hesar ikki fella í so góða jørð hjá einstøku politikarunum.

Nú hevur so stjórin í SamViti lagt seg út í hetta orðaskifti, og gott tað sama. Gævið onnur eisini gjørdu tað. Sosialurin og Miðlahúsið vilja fegin vera partur av hesum orðaskifti og leggja pláss og rúmd til tað. Tí prentaðu vit eisini opið bræv frá SamViti í blaðnum í gjár við teirri vón, at tað eisini kann eggja almenninginum til at luttaka í hesum so týðandi orðaskiftinum, sum vit vita, vil vera partur av komandi valstríði eisini. Lat okkum gera valstríðið til nakað meira enn bara eitt stríð og eina kapping millum flokkar. Fortreytin fyri tí er eitt breitt og sakligt orðaskifti, sum m.a. snýr seg um raðfestingina av framtíðar íløgum.

Er nakar dugur í landsstýrinum, so eigur eisini tað at tora at venda longu tiknum avgerðum. Tað eigur at lesa brævið frá stjóranum í SamViti væl og virðiliga og taka tað við í sínar framtíðar metingar. Henda áheitan hennara er jú so krystallklár. Raðfestið íløgur rætt, soleiðis at tær fyrst og fremst koma einum framtíðar og meira fjøltáttaðum vinnulívi til góðar heldur enn at halda fram við at raðfesta undirstøðukervið her heima. Øll eru vit samd um, at fortreytin fyri menning og trivnaði í hesum oyggjalandi er eitt gott undirsstøðukervi. Men tíðin er komin hartil, at vit nú eiga at raðfesta íløgur og játtanir á fíggjarlóg til menning av vinnulívinum. Tíverri mugu vit tó staðfesta, at okkara politiska skipan í alt ov stóran mun megnar ikki at fylgja við og taka til sín tey skilagóðu sjónarmið, ávaringar og "neyðarróp", sum koma frá fakliga kompetentum fólki í bæði almennum og privatum størvum. Spennandi verður at síggja, hvussu hesar áheitanir fara at síggjast aftur á komandi fíggjarlóg hjá tí annars so skilagóða Magna Laksáfoss. Man hann fara at raðfesta eitt nú menningarstovnin SamVit hægri?

**Sosialurin**

## Nú tagni Magni, hann spillir agnið

**BILL JUSTINUSSEN**
løgtingsmaður



Magni hevur púra rætt, men sannleikin er ikki væl lýddur í samgonguni. At sosialir skeivleikar eru í broyttu skattaskipanini hevur Miðflokkurin víst á í longri tíð. Tað er truplari nú enn áður at vera verkafólk, tí samstundis sum skattalættar eru veittir, er skattingin av fyrstu krónu økt munandi. Felags fyri sosialu gjøldini, sum fara av hvørji lønarflyting saman við sjálvum skattinum, er, at tey verða roknað av fyrstu krónu. Tey spyrja ikki eftir, um løntakarin er há- ella lágløntur. Heldur ikki virða tey botnfrádráttin, og sjálvt 10-ára gamli skúladrongurin, sum egnir sær nakrar fáar stampar til lummapening, skal gjalda meir og meir til samhaldsfasta. Tí fer ein størri og størri villeiðing fram, tá skattalættin og gjaldið úr samhaldsfasta verða sýnd fram sum stór avrik. Ei undur í, at annars tigandi samgongulimir nú brádliga geva ljóð frá sær, nú teirra skattapolitikkur verður avdúkaður sum annað enn rósudansur fyri tey lágløntu.

Longu 23. nov. 2005 vísti eg í einum trivnaðarnevndaráliti á sosialu skeivleikarnar, og nú sjálvur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ger vart við trupulleikan, fari eg við hesum at stuðla honum í hesum sambandi. Álitið varð skrivað í sambandi við økta gjaldið í AMEG.

Ein minniluti (Bill Justinussen) vísir á, at Miðflokkurin er sera ivasamur um skattapolitisku gongdina seinastu tvey árini. Samanumtikið hevur samgongan minkað um samhaldsfestið í skattaskipanini, har meginreglan er, at tær breiðastu herðarnar bera tyngstu byrðarnar. Landsskattastigin er progressivur, meðan øll onnur skatting er proportional ella beinleiðis degressiv. Við alla aðra skatting meinast við m.a. kommunuskatt, barsilsskipan, arbeiðsloysisskipan, samhaldsfasta, vegskatt, kringvarpsgjald, oljuavgjald, sjúkrakassagjald umframt onnur avgjøld og brúkaragjøld. Fyri kommunuskatt, BAS, ALS og AMEG er galdandi, at goldið verður ávísur prosentpartur av hvørjari vunnari krónu (tó kommunuskatturin fyri tað, sum er omanfyri botnfrádráttin). Sostatt rindar bæði tann láglønti og hálønti sama prosentpart. Hóast skipanin ber heitið samhaldsfasti arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, er talan um eina minni samhaldsfasta skipan, enn fólkapensjónin er. Fólkapensjónin er fíggjað yvir landsskattin, har tann láglønti nærum ongan skatt rindar, meðan tann hálønti av síðst vunnu krónu kann rinda væl omanfyri 50%. Tó hava øll rætt til sama útgjald. Um politiska ætlanin er líðandi at lata fólkapensjónina gerast minni partur av samlaðu pensjónini, samstundis sum samhaldsfasti skal gerast ein størri partur, er talan samanlagt um eina minni samhaldsfasta skipan. Hesi gongd tekur Miðflokkurin ikki undir við og mælir landsstýrismanninum til at kanna møguleikarnar fyri at broyta skipanina við samhaldsfasta, so hon kemur at fylgja somu meginreglum sum landsskattafíggjaða fólkapensjónin, tvs. at øll hava rætt til sama útgjald, men inngjaldið verður inntøkujavnað.

Trupulleikin við proportionala skattinum er, at hann rakar tey lágløntu harðast. Botnfrádrátturin, sum er ein trygd fyri, at øll - uttan mun til inntøku – fáa tær fyrst vunnu krónurnar útgoldið skattafrítt, er ikki galdandi fyri ALS, BAS og AMEG. Fyri lágløntan persón, sum júst er byrjaður arbeiðslívið, tykist tað møtimikið at gjalda inn í eina tvungna eftirlønarskipan tey næstu 40 árini, fyri síðani at fáa ágóðan, tá pensjónsaldurin er náddur. Rokningin skal gjaldast ídag, ágóðin kemur um 40 ár. At nýta samhaldsfasta sum grundgeving fyri at veita miðal- og háløntum skattalætta er herskin biti hjá arbeiðaranum.

Miðflokkurin heldur, at landsstýrismaðurin eigur at hava hesi sjónarmiðini við, tá eftirlønarviðurskiftini verða endurskoðað. Neyðugt er at stýra soleiðis politiskt, at øll, sum koma í pensjónsaldur, hava eina góða eftirløn, men hetta verður ikki gjørligt, um tey lágløntu skulu bera sama part sum tey háløntu.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.